# Ramsar arbeiðið, sum varð gjørt í Skúvoynni í 2023

Jóhannis Danielsen og Bergur Olsen 14-12-2023

**Endamál.** Endamálið við teljingunum á Skúvoynni er at fáa langar tíðarseriur, og tí verða somu teljingar í flestu førum endurtiknar á hvørjum ári. Í summum førum, har tað tekur langa tíð at telja, ganga fleiri ár ímillum teljingarnar.

## Høvdin

### Sjálvvirkandi fototól

Tvey fototól tóku 1 mynd/tíma av tveimum økjum í Høvdanum, sum vanligt, frá tí at lomvigin og ritan byrja at verpa, seinast í mai, til ungarnir eru floygdir umleið 10. august.

Tað eina myndatólið tók myndir av sonevndum hellifugli (ið ikki reiðrast), og hitt av rókum við fitt av reiðrandi fugli. Myndatilfarð finst fyri fleiri ár, men myndirnar eru ikki viðgjørdar enn. Ætlanin er at nýta nakað av RAMSAR fíggjing hvørt ár til at viðgera myndirnar fyri at kanna talið av fugli gjøgnum dagin.
Undanfarin ár hevur nakað av hesum myndatilfarðinum verði viðgjørt, men í ár var dentur lagdur á at telja samlaða talið av fugli í Høvdanum.

### Teljing av fugli eftir myndum

Lomvigin í Høvdanum hevur verið taldur á hvørjum ári síðani 1972, undantikið í 1975. Fram til 2017 varð fuglurin taldur beinleiðis við kikara, sum økti 25 ferðir. Síðani tá hevur fuglurin verið taldur á digitalum myndum í høgari góðsku. Síðani 2001 er eisini ritan og havhesturin taldur og skrásett verður, hvussu nógvir ungar koma undan. Fyri at kunna skráseta, hvussu nógvir ungar koma undan, er neyðugt at telja tríggjar ferðir. Høvdin varð tí avmyndaður tríggjar ferðir.

### Fotomyndir vóru tiknar av øllum Høvdanum til at telja lomviga, ritu og havhest eftir.

Fuglurin verður taldur eftir myndum á telduni. Hetta tekur o. u. ein mánað. Myndirnar verða tiknar hesar dagar:
15. juni: 50 myndir til at telja lomviga, ritu og havhest eftir.
25. juli: 50 myndir til at telja ritungar eftir.
15. augst: 50 myndir til at telja havhestaungar eftir.

**Lomvigi**: Lomvigin verður taldur á øllum, o.u. 300, plássunum. Fyri hvørt pláss verður skrásett talið á lomviga og hvussu nógvir síggja út til at bøla.
**Rita:** Ritan í øllum Høvdanum verður tald. Høvdin er býttur upp í eini 50 øki. Fyri hvørt øki verður skrásett talið av reiðrum og talið av ritum. Tá ið pisurnar eru um at vera floygdar, verður talið av pisum og ritum skrásett á sama hátt.
**Havhestur:** Havhesturin verður skrásettur beinleiðis á myndir av øllum Høvdanum, so úrslitið frá hvørjum einstøkum reiðri verður funnið. Skrásett verður, um fuglurin er á einum reiðurplássi, um hann sær út til at bøla ella ikki. Tá ið ungarnir eru um at vera floygdir, verður skrásett hvørji reiður hava unga.

Í ár var ein mannagongdin broytt nakað, samanborið við undanfarin ár, við tað at uml. 350 myndir vórðu tiknar at telja eftir. Hetta var gjørt fyri at fáa betur loysni á myndunum, og harvið betra um møguleikan at síggja allan fuglin. Víðari var eisini dentur lagdur á at fáa talt samlaða talið av lomviga, ritu og havhesti 2019, 2020, 2021, 2022 og 2023 heldur enn at gera meira nágreiniligu skrásetingina av hvørt lomvigin sær út til at bøla, og hvussu nógv kom undan hjá ritu og havhesti (mynd 1), men vónandi verður fíggjing og tíð til at gera hesar kanningar komandi árini.




Mynd 1. Samlað tal av lomviga, ritu og havhesti í Høvdanum, Skúvoy frá 1972 til 2023.

Sum sæst á myndini var ein lítil øking í talinum av lomviga í 2023, samanborið við 2019-2022, ímeðan talið av bæði ritu og havhesti minkaði nógv frá 2022 til 2023. Um miðan september fekk Fuglakanningarstøðin fráboðanir um at tað fleyt ein ørgrinna av deyðum havhesti úti á opnum havið. Nakrir havhestar vóru kannaðir eftir hetta, og vísti tað seg at teir høvdu fuglakrím (HPAI). Samstundis vita vit at ritan var rakt av fuglakrími ymsastaðni, og tí er ikki óhugsandi at hendan minkingin av bæði havhesti og ritu skyldast fuglakrími.

Fuglateljingarnar í Høvdanum verða nýttar sum indikator fyri gongdina hjá lomviga, ritu og í vissan mun havhestinum um alt landi. Tí er týdningarmikið at eftirkannað hvussu væl egnaðar teljingarnar í Høvdanum eru til hetta endamálið. Tí var orka eisini nýtt uppá tær teljingar ið hava verði um alt landið, av lomviga og ritu (mynd 2).




Mynd 2. Gongdin hjá lomviga og ritu um alt landið grunda á teljingar í 1972, 1987, 1998 og frá 2007-2014.

Sum sæt á myndini er talið av lomviga minka uml. 2/3 síðan 1972. Á mynd 1 sæst at lomvigin í Høvdanum eisini er minkaður uml. 2/3 síðani 1972 og at gongdin annars minnir nógv um gongdina um alt landið samlað. Hetta merkir at Høvdin er sera væl egnaður sum kanningarstað viðv. gongdini hjá lomviganum í Føroyum.

Fyrsta teljing um alt landi av ritini var í 1987, og hava vit tí ikki nøkur tøl fyri 1972 at samanbera við. Gongdin frá 1987 um alt landi minnir ógvuliga nógv um gongdina hjá lomviganum frá 1987 og fram og er minkingin gott 60% (mynd 2).

Talið av ritu í Høvdanum kann sveiggja rættiliga nógv ymsu árini (mynd 1) men samanumtikið kann man siga at minkingin í Høvdanum frá 2001 til 2023 er uml. 54%. Spurningurin er um tað ikki er rættast at nýta tal av reiðrum, heldur enn tal av fugli at samanbera við, síðan fuglurin kann verða úti og leita sær føði tá teljingin verður gjørd.

## Byrgisbakki - lundar

Ein telda við 16 vevmyndatólum fer at standa í Byrgisbakka, sum vanligt, frá 25. mai til 15. september. Vevmyndir verða tyknar inni í 14 lundareiðrum alt samdøgurið, frá ti at lundarnir byrja at verpa, til teir fara av stað aftur; frá hálvum mai til mitt í september. Útgerðin skal eftirhyggjast o.u. 14. hvønn dag, og linsurnar skulu vaskast, tá ið tær verða skitnar. Ætlanin var at stroyma upptøkurnar á heimasíðuni hjá Havstovuni, frá tí at pisurnar koma út, til tær verða floygdar. Hetta arbeiði gekk sum ætla, tó so at trupuleiki var av og á við streamingini. Eisini vóru ymsir teldu trupuleikar.

# Ljósloggarar

Í samstarvi við Norsk Polarinstitut verða ljósloggarar settir á 30 lundar og 30 ritur fyri at kanna, hvar teir halda til um veturin. Fyri at kunna lesa úrslitini úr loggarunum, mugu fuglarnir fangast aftur, vónandi í 2024. Av tí at torført er at koma til ritur í Skúvoynni verða loggararnir settir á ritur í Stóru Dímun.

## Telja lundaholur

Í 1993 taldu vit lundaholurnar í trimum smáum lundalondum. Í 2016 endurtóku vit teljingina í einum plássi í Skorðini, og í 2018 taldu vit lundar í einum plássi afturat í Skorðini. Tað triðja plássið er suðuri í Berginum, men tað er ikki so lætt at telja, so har var onki gjørt í hvørki 2021 ella 2022, men møguligvís hetta verður gjørt í 2024.

## Líraveiðan

Veiðan av lírum verður skrásett frá 10.-16. September, og magar og garnar frá 50 lírum verða savnaðir.

Hetta arbeiði skuldi gerast í samstarv við Umhvørvisstovuna, sum skal yvirtaka hetta arbeiði framyvir. Men ikki gekk heilt sum ætla við innsavningini í 2021, og tí yvirtók Fuglakanningarstøðin hesa yvirvøku aftur í 2022 og vóru magar samlaðir í 2023.